

# Ársfrágreiðing FURs fyri árið 2022

# Innihaldsyvirlit


Fíggjarlig viðurskifti ..... 3
Starvsstjórnin ..... 4
Dagliga virksemið ..... 4
Árligur stuðul ..... 5
Stuðulsgrunnur FURs ..... 6
Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs ..... 6
Stuðulsgrunnurin – umsøkjarar, verkætlanir og avgerðir ..... 6
Heiðurslønir ..... 8
Heiðurslønir latnar á Landsfundi FURs 2022 ..... 8
Skatefelagið ..... 8
Árni Skaale ..... 9
Marita Vestergaard á Lágabø ..... 9
Dátuvernd ..... 10
Barnaváttanir ..... 11
Heimasíðan ..... 12
Skeið um sosialar miðlar ..... 12
Skeið um børn við serligum tørvi ..... 13
Les og Lær í Føroyum Les og Lær í Føroyum er eitt samstarv millum FUR, Mentamálaráðið, yrkisfeløg og arbeiðsgevarafeløg ..... 13
NordUng (fyrrverandi NSU) ..... 14
NORÐ ..... 14
NORÐ – Ungdómstingið ..... 15
Frágreiðing frá luttakarunum um luttøkuna á Ungdómstinginum: ..... 15
Ráðstevna hjá Norska Ungdómsráðnum (LNU) ..... 15
Frágreiðing frá umboðunum um luttøkuna á ráðstevnuni ..... 15
Qooqqut festivalur í Grønlandi ..... 16
Frágreiðing frá umboðunum um luttøkuna á ráðstevnuni ..... 16
Umhvørvisráðstevnan +50 ..... 17
Frágreiðing frá umboðnum um luttøkuna á ráðstevnuni ..... 17
Ungdómsvenjingin hjá NUBF ..... 17
Frágreiðing frá umboði um luttøkuna á ráðstevnuni ..... 17
NORDBUK ..... 18
Norden 0-30 ..... 18

# Um Føroya Ungdómsráð

***FUR er felagsumboð fyri landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapir í Føroyum við 49 feløgum, harav 22 limafeløg og 27 lokalfeløg.***

***FUR umboðar samantalt umleið 4.000 børn og ung í Føroyum yngri enn 30 ár, sum eru í sjálvbodnum barna- og ungdómsfelagsskapum við fjølbroyttum frítíðarvirksemi innan sjónleik, tónleik, føroyskan dans, kórsang, borðspøl, fráhaldsvirksemi, politisk ungmannafeløg, mannarættindi, kristiligt barna- og ungdómsvirksemi, millumlanda barnalegur, skiftisnæmingar, skótar og annað barna- og ungdómsvirksemi.***

FUR hevur til endamáls, at:

- vera felagsumboð fyri limafelagsskapirnar
- viðgera spurningar, ið viðvíkja føroyskum ungdómi
- skapa áhuga fyri ungdómsmálum
- eggja ungdóminum at taka lut í og fáa ávirkan á samfelagið
- umboða limafelagsskapirnar í samstarvi við myndugleikarnar
- menna samstarvið og sínámillum fatan millum føroyskan ungdóm
- menna millumtjóða fatan

Á Landsfundinum í 2021 samtykti aðalfundurin broytingar í viðtøkunum viðvíkjandi krøvum til limafeløg, sum verða upptikin í FUR. Feløgini skulu hava viðtøkur, sum greitt tilskila, at felagið er ein barna- og/ella ungdómsfelagsskapur. Eisini er ásett, at fleiri enn helvtin at limunum skulu vera yngri enn 30 ár og at meginparturin av virkseminum skal vera barna- og ungdómsvirksemi.

# Fíggjarlig viðurskifti

FUR verður fíggjað á Fíggjarlógini og við veddingarpengum, sbrt. løgtingslóg um ítróttarvedding, og við limagjaldi.

Játtanin á fíggjarlógini til FUR var í 2022 óbroytt kr. 330.000 sammett við undanfarin ár. Játtanin er til at stuðla ungdómsarbeiði til tess at menna ungdómin í øllum lutum. Stuðul verður m.a. veittur til upplýsing um útbúgvingarmøguleikar, sum FUR stendur fyri.

FUR fekk lutað kr. 3.130.000 frá Sp/f Ítróttarvedding í 2022 í sín part.

Í limagjaldi frá limafeløgunum fekk FUR kr. 4.300 og kr. 50.000 frá Norð- verkætlanini, sum FUR er partur.

# Starvsstjórnin

FUR verður stjórnað av einari starvsstjórn, sum hevur 5 limir og 2 eykalimir. Starvsstjórnarlimir verða valdir á landsfundinum fyri eitt ár í senn, men formaðurin verður valdur fyri 2 ár og síðan fyri 1 ár.

Starvsstjórnin vald á Landsfundi FUR's í 2022:
Rói B. Poulsen, *formaður*
Erling Mørkøre, *nevndarlimur*
Bogi J. Petersen, *nevndarlimur*
Jákup Joensen Eskildsen, *nevndarlimur*
Silja Av Reyni Wennerström, *nevndarlimur*
Ragna Maja Kruse, *eyka nevndarlimur*
Ebba Sofía Kruse, *eyka nevndarlimur*



Starvsstjórnin hevur havt 6 fundir í starvsstjórnarskeiðnum 2022-2023.

# Dagliga virksemið

FUR umsitur árliga stuðulin sambært løgtingslóg um ítróttarvedding til limafeløg og lokalfeløg og sambært reglugerð og viðtøkum fyri FUR og skal tryggja m.a., at treytirnar eru loknar, og at stuðulin verður nýttur sambært reglugerðini. Í miðal viðger skrivstovan 35-40 umsóknir um árligan stuðul hvørt ár.

Eisini umsitur FUR Stuðulsgrunn FURs, har talan somuleiðis er um fyrisiting og um starvsstjórnaravgerðir. Umleið 20-30 umsóknir verða fyrireikaðar og viðgjørdar hvørt ár.



Skrivstovan hjá FUR fyrireikar og viðger íalt 55-70 umsóknir um árið. Starvsstjórnin hevur umleið 6 fundir um árið.

Í umboðsstjórnini eru 2 fundir um árið.

FUR fyrireikar somuleiðis fyrispurningar og tilmæli í sambandi við limaupptøku og møgulig tilmæli um eksklusión.

FUR ger kunning og vegleiðing til feløgini um t.d. barnaváttanir og dátuvernd.

FUR er virkin limur í NordUng. FUR hevur umboð í stýrinum og samskipar kunning o.a. í sambandi við, at føroysk ung luttaka á ráðstevnum, leiðaraskúla, ungdómsviku o.a.

Eisini er FUR virkið í verkætlanini NORÐ, sum virkar fyri at skapa burðardyggar felagsskapir og at styrkja sambandið ímillum ung í Norðurlondum. FUR hevur tvey umboð í stýrisbólkinum.

FUR ger innstillingar til nevndir og verkætlanir eftir áheitan frá føroyskum myndugleikum og millumlanda felagsskapum. Eisini svarar FUR ymsum dagligum fyrispurningum, áheitanum og kanningum í sambandi við barna- og ungdómsarbeiði frá einstaklingum, felagsskapum í Føroyum og uttanlands og frá føroyskum myndugleikum o.a.

FUR kann eisini taka stig til verkætlanir og luttaka í verkætlanum.

Eisini vegleiðir FUR dagliga felagsskapum í FUR og kunnar feløgini við kunningarteldupostum.

FUR skipar eisini fyri skeiðum til nevndir, leiðarar og limir í feløgunum í FUR.

Harumframt FUR er virkið á facebook og instagram at kunna føroysk ung um ungdómsmál, møguleikar at luttaka í verkætlanum og á skeiðum, sum FUR skipar fyri.

# Árligur stuðul

Fyri at fáa árligan stuðul skal talan vera um landsfelagsskap, sum er limur í FUR, ella lokalfelag, sum hevur limaskap í einum av limafelagsskapum FURs.

18 limafeløg og 17 lokalfeløg fingu játtað árligan stuðul í 2022 fyri stuðulsárið 2021.

Landsfeløgini fingu kr. 1.396.138 samanlagt, og lokalfeløgini fingu samanlagt kr. 806.612 í 2022. Samlaður árligur stuðul til limafelagsskapir og lokalfeløg var kr. 2.202.750 í 2022.

Limafelagsskapir, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir undir 30 ár tann 31.12. í undanfarna ári við umboðum í minst trimum av hesum økjum: Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Vágum, Eysturoy, Norðoyggjum, Sandoy og Suðuroy.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur við ásetingum, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.



**Mynd frá legu hjá BKU í Norra og Blåbandet í Svøríki**

*Stk. 4.* Lokalfeløg, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir undir 30 ár tann 31.12. í undanfarna ári. Eru fleiri enn eitt lokalfelag í sama býi/bygd, skulu tey fylgjandi lokalfeløgini hava í minsta lagi 25 gjaldandi limir hvørt.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur við ásetingum, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Verið limir í landsfelagi í minsta lagi eitt ár, áðrenn tey kunnu søkja um stuðul - tó undantikið úr Stuðulsgrunni FURs.
8. Limaskap í einum landsfelagi. Lokalfeløg kunnu - í stuðulshøpi - bara vera limir í einum landsfelagi.
9. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.

Næmingafeløg verða ikki roknað sum lokalfeløg, men tey kunnu søkja stuðul, sum er kr. 2.000,- hvørt ár. Stuðul kann ikki verða veittur ítróttarligum endamálum.

# Stuðulsgrunnur FURs

Eftir umsókn kann stuðul verða latin limafelagsskapum og lokalfeløgum fyri serliga góðar verkætlanir børnum og ungum at gagni ella fyri samfelagsgagnligar verkætlanir, har børn og ung eru virkin.

Stuðul úr Stuðulsgrunni FURs verður býttur so ofta, sum starvsstjórnin heldur tað hóska best. Ongar umsóknarfreistir eru galdandi, og umsóknir koma til viðgerðar og verða svaraðar, so hvørt tær koma inn.



Mynd av Tabletop Føroyar tiltakinum SvínaCon

Tey, sum fáa stuðul úr Stuðulsgrunni FURs, hava skyldu til at lata FUR skrivliga frásøgn frá tí stuðlaðu verkætlanini í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at hon er framd. Frágreiðingarnar verða lagdar á heimasíðu FURs fur.fo. Stuðul verður bert latin eina ferð til sama tiltak.

Starvsstjórnin tekur støðu til umsóknirnar. Starvsstjórnin kann eisini lata vera við at veita stuðul, um eingin skikkað umsókn eftir hennara meting er komin. Søkt verður um stuðul úr Stuðulsgrunninum umvegis heimasíðu FURs.

## Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs

Í roknskaparárinum 2022 varð stuðul latin til verkætlanir úr Stuðulsgrunni FURs samantalt kr. 420.240.

### Stuðulsgrunnurin – umsøkjarar, verkætlanir og avgerðir

| Stuðulsgrunnur FURs | Verkætlan | Stuðuls-umbøn | Avgerð | Játtað |
|---|---|---|---|---|
| **KFUM skótarnir í Føroyum** | Skótaverkstaður | 120.000 | Ja | 80.000 |
| **Ung í dansi** | Havleik | 50.000 | Ja | 50.000 |
| **KFUK í Havn** | Familjutiltak/føstulávintstiltak | 5.000 | Nei | - |
| **Dramaverkstaðið** | Leikurin "Ljós í myrkri" Spírin (9-12 ár) og Aksið (13-16 ár) | 37.040 | Ja | 37.040 |
| **Sosialistisk Ung** | DSU- páskaskeið 2022, 6 luttakarar | 7.800 | Ja | 7.8000 |
| **KFUM skótarnir í Føroyum** | Spæli og bátahylur á Selatrað | 50.000 | Ja | 40.000 |
| **KFUM skótarnir í Føroyum** | Smáttur á Selatrað | 155.000 | Ja | 45.000 |
| **CISV** | Luttøka á European Junior Branch Meeting, 2 luttakarar | 15.000 | Ja | 6.000 |
| **Amnesty Ung** | Mannarættindacafé | 6.000 | Ja | 1.000 |
| **Skótabólkurin Leirvíks Pálls** | Uttanlandslega í Sveiss, 11 luttakarar og 1 leiðari yngri enn 30 ár | 50.000 | Ja | 16.800 |
| **Havnar KFUK skótar** | Spejdernes Lejr, 188 luttakarar | 25.000 | Ja | 25.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **KFUM og KFUK skótarnir í Klaksvík** | Spejdernes Lejr 2022 | 6.000 | Ja | 6.000 |
| **Tabletop Føroyar** | Borðspælslega í Svínoy (SvínaCon) | 24.740 | Ja | 20.000 |
| **Skótalið KFUMs** | Trý shelter | 90.000 | Nei | - |
| **BKU** | Leiðaralega | 25.000 | Ja | 18.000 |
| **BKU** | Uttanlanda ungdómslegur | 15.000 | Ja | 7.000 |
| **KFUM skótarnir í Føroyum, Føroya Skótasamband og Føroya KFUK skótar** | Luttøka á World Scout Jamboree, 34 luttakarar | 112.000 | Ja | 47.600 |
| **Blákross Ungdómur** | Sonos hátalarar til nýggju ungdómshølini | 30.000 | Nei | - |
| **Tabletop Føroyar** | Rolluspælstilboð til ung | 18.000 | Ja | 18.000 |
| **KFUM- og KFUK skótarnir í Klaksvík** | Leiðaraskeið | 5.000 | Ja | 5.000 |

Starvsstjórnin hevur viðgjørt 20 umsóknir um stuðul úr Stuðulsgrunni FURs í 2022 frá lands- og lokalfeløgum í FUR. 17 verkætlanir fingu játtandi svar og tríggjar umsóknir fingu noktandi svar. Tabletop Føroyar afturbar stuðul kr. 10.000, sum var játtaður til verkætlanina Borðspælsløtur á fólkaskúlum í 2021 av tí, at verkætlanin ikki bleiv framd.

# Umboðsstjórnarfundir

Umboðsstjórnarfundir vóru 2. juni og 14. desember 2022.

Umboðsstjórnin er ein kunnandi og mennandi millumliður millum starvsstjórnina og limafelagsskapirnar.

Punkt á skrá til fundin 2. juni 2022 var árligi stuðulin, skeið, flóttar, áseting um uppstillan og val, skattafría upphæddin, sum ikki er galdandi fyri hjálparfólk í barna- og ungdómsarbeiði hjá feløgum í FUR og barnaváttanir.

Punkt á skrá til fundin 14. desember 2022 var vegleiðing um barnaváttanir, skeið um børn við serligum tørvi, umboð í Nordbuk 0-30 og Volt.

Punkt á skrá frá KFUM skótunum Í Føroyum var íkast til kjak um, hvussu FUR kann nýhugsast og um broyting av, hvussu nevnd og formaður verða vald.

Seinasta punktið á skránni var arbeiðsbólkur um skattafría upphædd.



**Mynd frá umboðsstjórnarfundinum 2. juni 2022**

# Heiðurslønir

Starvsstjórnin í FUR letur árliga heiðursløn til verkætlanir og einstaklingar. Heiðurin verður latin á landsfundi FUR's. Latnar vera upp til tríggjar heiðurslønir. Heiðursløn FURs er eitt heiðursbræv og ein heiðursløn kr. 5.000 - 10.000.

Veittar kunnu verða millum ein og tríggjar heiðurslønir. Heiðurslønin verður givin einstaklingum og verkætlanum.

Øll kunnu innstilla verkætlanir og einstaklingar til heiðursløn; m.a. eru tað ikki bert feløgini í FUR og nevndirnar í feløgunum, sum kunnu innstilla, men eisini einstakir limir, eins og foreldur v.m.

Til ber at lata inn fleiri innstillingar og at senda inn aftur áður innsendar innstillingar.

Endamál FURs við at lata heiðurslønina er:

1. at geva eldsálum innan barna- og ungdómsfelagarbeiði viðurkenning
2. at geva virknum barna- og ungdómsfeløgum viðurkenning fyri sítt arbeiði
3. vekja áhugan millum børn og ung fyri sjálvbodnu barna- og ungdómsfelagsskapunum
4. at vísa á samfelagsliga týdningin av arbeiðinum hjá sjálvbodnum barna- og ungdómfelagsskapum.

## Heiðurslønir latnar á Landsfundi FURs 2022

Á landsfundinum hjá FUR 26. mars 2022 handaði Rói B. Poulsen formaður í FUR heiðurlønirnar, sum stjórnin hevði avgjørt at lata til Skatefelagið, Árna Skaale og Maritu Vestergaard í Lágabø.

### Skatefelagið

**Heiðursløn FURs varð latin til Skatefelagið fyri at hava megnað at brotið upp úr nýggjum og at kveikt eitt rúmligt og stimbrandi umhvørvi til børn og ung.**

Eldsálirnar í Skatefelagnum, sum skipa fyri virkseminum á Bacalao, eiga viðurkenning uppiborna fyri sítt stóra og kveikjandi arbeiði millum børn og ung í ymsum aldursbólkum og á ymsum førleikastigum.

Tey hava megnað at skapt eitt umhvørvi, sum ikki er merkt av sínámillum kapping, men heldur stuðli og stuttleika – og sum kortini er borið av gleði um og virðing fyri teimum, sum av álvara taka seg fram á hesum økinum.



**Mynd av umboðum fyri Skatefelagið og formanninum í FUR.**

## Árni Skaale

**FUR Heiðurslønin varð latin til Árna Skaale fyri at vera ein eldsál í skótarørsluni í Føroyum.**



**Mynd av Árna Skaale og formanninum í FUR.**

Eftir at skótaliðið lá í dvala eina tíð, tók Árni við sum fylkisleiðari hjá Skótaliði Nólsoyar Páls í 2013.

Skótaliðið er vaksið og bjóðar nú virksemi til allar aldursbólkar. Árni var eisini ein av stigtakarunum til at endurbyggja Skúvadalssmáttuna sunnan á Borðoynni við at fáa gamlar og yngri skótar at standa saman um arbeiðið hjá Skótaliði Nólsoyar Páls. Eftir stendur ein perla í tí náttúruvakra Skúvadali, og samanhaldið um skótaliðið er styrkt. Arbeiðið at menna skótaliðið og at gera Skúvadalssmáttuna av nýggjum hevur kravt bæði treysti, dirvi og áhaldni.

## Marita Vestergaard á Lágabø

**Heiðursløn FURs varð latin til Maritu Vestergaard í Lágabø fyri sítt megnararbeiði í KFUM-skótabólkinum Royndini í Vági.**

Marita er grundsúlan í skótaarbeiðinum í Vági og hevur lagt nógva orku, tíð og eldhuga í at hava eitt virkið skótalið í Vági.

Við einum persóni sum Maritu, ið fær foreldur og onnur at hjálpa sær, er møguligt at hava ein virknan skótabólk í Vági.

Marita hevur sum størsta ynski, at børn og ung í Vági hava møguleika at gerast skótar og uppliva tann góða og mennandi felagsskap, sum skótarørslan er.



**Mynd av Maritu Vestergaard á Lágabø.**

# Dátuvernd

Í samband við at nýggja dátuverndarlógin kom í gildi 1. januar 2021, leggur FUR dent á at kunna feløgini um dátuvernd.

Í tí sambandi skal vísast til tilfar um dátuvernd á heimasíðu FURs, sum fevnir um:

- Vegleiðing
- Skabilón til privatlívspolitikk - privatlívspolitikkurin skal vera atkomuligur fyri limirnar í feløgunum
- Skabilón til yvirlit yvir viðgerðir av persónupplýsingum - yvirlitið verður nýtt til at skráseta, hvussu feløgini viðgera persónsupplýsingarnar.

Um feløgini brúka dátuviðgerðar, so hava flest dátuviðgerðar standardavtalur. Víst verður til heimasíðuna hjá Dátueftirlitinum viðvíkjandi standard dátuviðgerðaravtalu og til lógir og reglur um dátuvernd.

Feløgini skulu eftir dátuverndarlógini upplýsa í privatlívspolitikkinum, at vanligir persónsupplýsingar verða latnir Føroya Ungdómsráð í samband við limaskap og umsókn um árligan stuðul.

Feløg í FUR, sum koma undir § 11 í dátuverndarlógini vegna t.d. politiska ella átrúnaðarliga sannføring kunnu ístaðin fyri at lata limalistan til FUR fáa eina váttan frá einum góðkendum grannskoðara, sum eftirkannar skjalagrundarlagið undir limalistanum t.d. limaskipan og kontoavrit til tess at staðfesta, at limalistin inniheldur limir yngri enn 30 ár, sum hava goldið í minsta lagi kr. 100 í limagjaldi í stuðulsárinum.

Starvsstjórnin legði tess vegna fram uppskot um broyting í reglugerðini á landsfundinum 2021, sum varð samtykt.

Ásett er í Reglugerð FURs, at letur felagið ikki inn limalista, kann felagið ístaðin veita eina váttan frá góðkendum grannskoðara, ið við síni undirskrift váttar limatal og limagjaldsinntøkur.

Grannskoðarin skal í slíkum førum gjøgnumganga limalistar og kontoavrit felagsins fyri at staðfesta og vátta samlaða limatalið av limum yngri enn 30 ár, ið hava móttikið og goldið uppkrav um limagjald upp á í minsta lagi 100 kr í stuðulsárinum.

# Barnaváttanir

Frá 1. juni 2022 er tað ein skylda hjá m.ø. felagsskapunum í FUR, at fáa til vegar eina barnaváttan, áðrenn persónur verður settur í starv ella til ávísa uppgávu, har tað ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn og ung undir 15 ár.

- Endamálið er at fyribyrgja kynsligum ágangi móti børnum og ungum undir 15 ár.
- Tað er eina skylda hjá felagsskapum at fáa til vegar eina barnaváttan, áðrenn persónur verður settur í starv ella til ávísa uppgávu, har tað ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn og ung undir 15 ár.
- Treytin um beinleiðis og regluligt samband skyldast, at tað á tann hátt kann uppbyggjast eitt álit millum barnið og viðkomandi. Hetta er galdandi sama um starvið ella uppgávan er lønt ella ólønt, ella um starvið ella uppgávan er varandi ella tíðaravmarkað.
- Kravið um barnaváttanir er galdandi fyri persónar, ið hava fylt 15 ár.
- Felagsskapir, ið seta persónar til ávísa uppgávu skulu útvega barnaváttan fyri øll fyrsta árið lógin er komin í gildi t.e. 1. juni 2022. Sostatt, verður sannlíkt mest arbeiði hjá felagskapunum at útvega barnaváttanir fyrsta árið.

## Hvat er ein barnaváttan?

Ein barnaváttanin er eitt serligt slag av revsiváttan, ið inniheldur upplýsingar um skuldsetingar, dómar, ákærufráfall v.m., í málum, ið snúgva seg um brotsgerðir móti børnum og ungum undir 15 ár.
Ein barnaváttanin minnir um eina revsiváttan, men er kortini øðrvísi, tí upplýsingarnir standa á váttanini í munandi longri tíðarskeið samanborið við eina revsiváttan. Tað stytsta tíðarskeiðið er 10 ár frá tí, at t.d. persónur hevur sitið dómin, ella at ákæran bleiv slept. Harnæst er tað 20 ár, ella til viðkomandi er vorðin 80 ár. Hvussu leingi brotini standa á barnaváttanini, veldst m.a. um slag av broti, og hvør avleiðingin av brotinum var fyri tann skrásetta. Av tí, at ein barnaváttan er ein sonevnd myndugleikaváttan, er tað bert tann, ið setur í starv ella setur til uppgávuna, sum kann fáa barnaváttanina til vegar.

## Hvat um tað av praktiskum ávum ikki ber til at fáa eina barnaváttan tíðs?

Í summum førum er tað ógjørligt at fáa til vegar barnaváttan, áðrenn persónur verður settur til ávísa uppgávu. Sum dømi kann nevnast, at tað ikki óvanligt, at summarlegurnar ikki fáa seinastu leguleiðararnar fyrr enn í síðstu løtu. Tí er eitt undantak í lógini. Um tað av praktiskum orsøkum ikki er gjørligt at útvega barnaváttan, áðrenn viðkomandi verður settur til ávísa uppgávu, ið ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, skal barnaváttanin verða fingin til vegar skjótast gjørligt og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi er settur til uppgávuna.

## Stigini í samband við barnaváttanir

1. **Kunnast beinanvegin**
2. **Nevndin/stýrið/leiðarin**
3. **Samtykki frá viðkomandi**
4. **Dagføringar av barnaváttanum**
5. **Oyðiblað**
6. **Talgild innlating ella innlating til avgreiðslurnar hjá løgregluni**.
7. **10 yrkisdagar ella meira**
8. **Um barnaváttanin vísir á revsiverd viðurskifti**
9. **Skráseting av barnaváttanini og burturbeining**
10. **Tagnarskylda**
11. **Um persónur noktar at geva samtykki**

Um barnaváttanin ikki verður fingin til vegar, verður tað revsað við bót í hvørjum einstøkum føri, sbr. § 10 í lógini.

# Heimasíðan

Allir formularar í samband við skráseting, umsóknir um árligan stuðul, umsóknir til Stuðulsgrunnin og heiðurslønir vóru løgd á heimasíðu FURs í 2022.

Í 2023 hevur verið arbeitt við at menna formulararnar. M.a. er nú møguleiki fyri at seta frámerki um ongar broytingar eru í árligu skrásetingini í mun til árið fyri. Eisini ber nú til at fáa váttan umvegis teldupost, umframt váttanina á heimasíðuna, tá ið upplýsingar eru latnar inn umvegis heimasíðuna.

Harumframt verður arbeitt við, at upplýsingarnar og tilfarið verður latið tí, sum sendir inn umvegis heimasíðuna sum teldupostur saman við váttanini.

# Skeið um sosialar miðlar

FUR skipaði fyri skeið til feløgini um strategiskt samskifti á sosialum miðlum 27. apríl 2022.

Sosialir miðlar geva felagsskapum møguleikar at røkka út til sínar limir, foreldur, leiðarar og lokalsamfelagið. Men hjá nógvum er tað kanska møtimikið at fara undir, tí tað er so nógv annað arbeiði sum skal gerast. Júst tí, er tað so týdningarmikið at brúka orkuna og tíðina miðvíst. Spurningar, sum vóru viðgjørdir á skeiðinum vóru: Hvat skal eg brúka - facebook, instagram, heimasíðu, sms boð, teldupost ella? Hvat skal eg leggja út? Og hvussu ofta?

Tá ein gevur sær stundir til at leggja eina miðvísa ætlan fyri samskifti á sosialum miðlum, kann fáast meiri burturúr. Uppgávan kann gerast minni arbeiðskrevjandi, tí ein hevur hugsað longur frameftir, og orkan verður brúkt miðvísari.




Ellivu umboð frá felagsskapum í FUR luttóku á skeiðnum.

Eftir skeiðið varð skeiðið eftirmett, sum vísti, at skeiðið var sera væl umtókt. Í eftirmetingini var m.a. spurt, hvat evni ein kundi arbeitt við á einum komandi skeiði um sosialar miðlar. Hugskotini vóru m.a. at hava skeið um praktisk amboð til at skapa tilfar til sosialar miðlar, og hvussu til ber at kanna úrslit av kampagnum á sosialum miðlum.

# Skeið um børn við serligum tørvi

Skeiðið til leiðarar og onnur í felagsskapum um børn við serligum tørvi var 16. mars 2023.



Sum barna- og ungdómsleiðari hevur ein upplivað, hvussu summi kunnu skapa órógv í felagsskapinum, uttan at ynskja tað. Onkuntíð kunnu leiðarar hava hug at kasta frá sær og kundu ynskt sær at vita meira um støðuna hjá børnunum og teimum ungu.

Endamálið við skeiðnum var at fáa tilvitan og amboð til at fáa øll við uttan sum leiðari at brenna út.

**Skeiðsevni:**

1. Tað mest vanliga, sum børn og ung stríðast við - grundleggjandi vitan um ADHD, autismu, OCD, tunglyndi, angist og orðblindi
2. At síggja tá børn og ung stríðast
3. Um sosialar førleikar
4. Gerandisdømi og støður, um hvat kann skapa trupulleikar, og hvar konfliktirnar liggja
5. Hvussu kunnu vit skapa góðar karmar fyri at fyribyrgja og handfara truplar støður?
6. Hvussu kunnu vit minka um sárbærið hjá tí einstaka?
7. At tosa við onnur børn, sum eru í felagsskapinum, um at nøkur børn stríðast eyka
8. Hvørjar fastar mannagongdir kann felagsskapurin brúka?

16 luttakarar frá feløgunum í FUR luttóku á skeiðnum. Arbeitt verður við møguleikanum at gera tilfar við kunning á heimasíðu FURs, til feløgini at nýta.

# Les og Lær í Føroyum

Les og Lær í Føroyum er eitt samstarv millum FUR, Mentamálaráðið, yrkisfeløg og arbeiðsgevarafeløg.

Ein grundleggjandi fortreyt fyri, at ung útbúgva seg í Føroyum, er kunning um útbúgvingartilboðini í Føroyum. Tískil tók FUR í 2013 stig til Les og Lær í Føroyum.




Les og Lær í Føroyum fevnir um tvær heimasíður, har upplýsingar um læru og lestrarmøguleikar í Føroyum eru savnaðar. Fyrstu 4 árini var bók útgivin, men avgjørt var ikki at geva tilfarið út í bók, og tí ístaðin at raðfesta talgilda miðling. Á heimasíðuni www.les.fo eru lýsingar av útbúgvingum, vegleiðingar, filmsbrot og onnur kunning. Heimasíðan www.studyinfaroeislands.fo er ætlað lesandi úr útlondum og lýsir tí útbúgvingar, stakgreinar og onnur lestrartilboð, sum eru áhugaverd í hesum sambandi. Síðan fevnir eisini um praktisk viðurskifti, t.d. uppihaldsloyvi, arbeiðsloyvi, bústaðarmøguleikar, skattarviðurskifti, livikostnað o.a.

Tilfarið er savnað inn frá Mentamálaráðnum, Yrkisdeplinum, útbúgvingarstøðum, stovnum og fyritøkum.

# Nevndarumboðan, skeið v.m.

## NordUng (fyrrverandi NSU)

NordUng er ein paraplyfelagsskapur fyri ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum og samstarvar við onnur lond í Evropa.

Endamálið hjá NordUng er at styrkja samstarvið og felagskensluna millum politiskar óheftar ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum og at fremja fakligu- og mentanarligu endamálini, sum hesi feløgini virka fyri.

**Vision**

NordUng's vision är, att vara plattform för Nordens mångfaldiga frivilliga ungdomsarbete, där kompetensutveckling, inspiration och inblick i aktuella ämnen skapas i en innovativ och stark nordisk gemenskap.

Á hvørjum ári skipar NordUng fyri ungdómsviku, ráðstevnum og verkstovum fyri børn og ung, sum limafeløg og lokalfeløg í FUR hava møguleikan at senda umboð til.

FUR hevur havt umboð í stýrinum í NordUng seinastu 7 árini. Silja Av Reyni Wennerström hevur umboðað FUR í stýrinum í NordUng í 2022.

## NORÐ

Endamálið hjá Norð er, at menna burðardyggar felagsskapir og at knýta sterkari bond millum ung í Norðurlondum. Mál og mentan eru reyðir træðrir í virkseminum hjá NORÐ. NORÐ stendur fyri einum árligum tiltaki - "Ungdómstinginum" og eini røð av virksemi frá 2022-2024 m.a. at ung kunnu vera við til at gera eitt norðurlendsk listaverk saman.

NORÐ

Fællesskaber mellem unge

Virksemið er til ung í millum 18-30 ár frá ungdómsfelagsskapum í øllum Norðurlondum.

FUR hevur tvey umboð í stýrisbólkinum fyri verkætlanini; Jákup Joensen Eskildsen og Hjørdis Gaard.

Dansk Ungdoms Fællesråd (DUF) samskipar NORÐ saman við systurfelagsskapunum í Norra, Svøríki, Finnlandi, Álandi, Íslandi, Grønlandi og í Føroyum.

A.P. Møller og frú Chastine Mc-Kinney Møller grunnurin fíggjar NORÐ.

# NORÐ – Ungdómstingið

Á Ungdómstinginum 2022 tóku seks ung úr feløgum í FUR lut.



Umboðini, sum luttóku á Ungdómstinginum í Norra.

Evnið á Ungdómstinginum var fólkaræði og heimsmálini.

Aldursbólkurin var 16-30 ár.

Tey seks, sum luttóku á Ungdómstinginum 5.-7. november 2022 í Svøríki vóru:
Bjørn Olsen, skótaliðið Borgin
Jósef Sivertsen, Tabletop Føroyar
Pól Johannus Toftegaard Larsen, KFUM og KFUK skótarnir í Fuglafirði
Jastrið Gullbein Augustinussen, Tabletop Føroyar
Maria Madsen, Amnesty Ung
Jákup Joensen Eskildsen, Tabletop Føroyar og starvsstjórnarlimur í FUR.

### Frágreiðing frá luttakarunum um luttøkuna á Ungdómstinginum:

*"Vit vóru 100 ung úr Norðurlondum, sum møttust í Svøríki fyri at arbeiða við, hvussu vit kunnu standa á odda fyri at røkka heimsmálunum, áðrenn 2030.*
*Á ungdómstinginum var bæði pláss til at læra og at hava tað stuttligt.*
*Vit høvdu ymsar verkstovur og fóru í bólkar, har vit valdu tað heimsmálið, ið vit ynsktu at arbeiða við. Nøkur av føroysku umboðunum arbeiddu við heimsmáli nummar 13; Umhvørvisátøk. Her arbeiddu vit m.a. við, hvussu vit kunnu broyta hugburðin hjá fólki til skundmóta, og hvussu atlit eisini mugu takast til umhvørvi og skundmóta í lóggávu. Skotið varð m.a. upp at upplýsa børn gjøgnum spøl ella sjónleik. Dømi var um, at á einum skúla í Finnlandi høvdu tey eitt "bókasavn", har man kundi læna veitsluklæðir. Sama kundi verðið gjørt til børn, har tey t.d. kundu lænt veitsluklæðir.*
*Vit hava eisini hugnað okkum við at spælt spøl, svomið og gjørt yoga. Alt var ókeypis, og vit vilja viðmæla øðrum limum í FUR um at søkja, tá ið Ungdómtingið verður aftur komandi ár😤👏🍀."*

# Ráðstevna hjá Norska Ungdómsráðnum (LNU)

Silja av Reyni Wennerström og Jákup Joensen Eskildsen, umboðaðu starvsstjórnina í FUR, á ráðstevnu hjá LNU 30.-31. august 2022 í Oslo.




Silja av Reyni Wennerström og Jákup Joensen Eskildsen á Utøya.

### Frágreiðing frá umboðunum um luttøkuna á ráðstevnuni

*"2022 er árið fyri sjálvboðið arbeiði í Noregi, og í tí sambandi vóru vit boðin at hátíðarhalda ungdóm, fólkaræði og norðurlendskt samstarv saman við LNU og øðrum felagsskapum.*

*Umframt vitjan á Utøya, luttóku vit á einari ráðstevnu í Oslo, har granskarar, sjálvboðin og onnur greiddu okkum frá, hvussu ein kann menna luttøkuna hjá ungum í fólkaræðinum.*
*Vit hoyrdu millum annað eina framløgu frá einum sjálvbodnum úr felagsskapinum "Students at Risk", um hvussu tey arbeiddu fyri rættinum at vera lesandi í politiskt óstøðugum londum.*
*Ein annar sjálvboðin greiddi okkum frá, hvussu tey kláraðu at hava sjálvboðið virksemi í norska útjaðaranum við avmarkaðum ferðamøguleikum.*

*Eisini greiddi ein av fyriskiparunum í "Golden Barbie" átakinum frá, hvussu tey kláraðu at menna eina so væleydnaða kampanju.*

*Afturat øllum tí vit lærdu, fingu vit møguleikan at hitta onnur, sum eisini vóru virkin í ungdómsfelagsskapum*".

# Qooqqut festivalur í Grønlandi

Jastrið Gullbein Augustinussen og Esbern á Geilini umboðaðu FUR á Qooqqut festivalinum í Grønlandi 13.- 14. august 2022.

## Frágreiðing frá umboðunum um luttøkuna á ráðstevnuni



**Á myndini eru Jastrið Gullbein Augustinussen og Esbern á Geilini saman við 12 norðurlendskum ungum, sum luttóku á ráðstevnuni.**

"*Vit høvdu eina sera spennandi og áhugaverda uppliving á Qooqqut ráðstevnuni. Vit vóru 12 norðurlendsk ung, sum fóru til Grønlands. Túrurin byrjaði í Nuuk, har vit fóru út at eta og lærdu hvønn annan at kenna, síðani sigldu vit inn í grønlendska fjørðin til Qooqqut.*
*Tað var serstakt at vera á ráðstevnuni, har vit svóvu í telti mitt í grønlendsku náttúruni og høvdu hvørki telefon ella netsamband. Vit vóru heppin við veðrinum. Tað var sól og klárt alla ráðstevnuna.*
*Á ráðstevnuni upplivdu vit grønlendska mentan við søgu, ítrivi, kajakk, mati, dansi og serliga tónleiki. Vit komu eisini at kenna hini úr Norðurlondunum sera væl og lærdu meira um teirra mentanir.*
*Hetta hevur verið ein serstøk uppliving, og vit eru takksom fyri at hava fingið hendan møguleikan".*

# Umhvørvisráðstevnan +50

Dánjal Hátún Augustinussen umboðaði FUR á Stockholm+50 2.-3. juni 2022.

### Frágreiðing frá umboðnum um luttøkuna á ráðstevnuni

*"Ráðstevnan varð hildin 50 ár eftir fyrstu ST-umhvørvisráðstevnuna, og tað var týðiligt, at kjakið hevur flutt seg nógv síðani 1972.*
*Mín høvuðsleiklutur var at umboða Føroyar á fundi við umhvørvismálaráðharrar úr Norðurlondum (tó ikki tí føroyska) dagin fyri sjálva ráðstevnuna.*
*Eg hitti ungdómsumboð úr Norðurlondum tveir dagar undan ráðstevnuni, og vit brúktu fyrsta dagin at læra hvønn annan at kenna og at fyrireika okkum til fundin dagin eftir.*
*Á fundinum vórðu vit deild upp í bólkar at arbeiða við ymiskum pørtum av Global Youth Policy Papers, ið vóru gjørd til ráðstevnuna.*
*Á sjálvari ráðstevnuni fingu vit rættiliga fríar teymar, og eg brúkti tíðina at fara til tiltøkini, ið vóru har.*
*Eg lærdi nógvar spennandi aktivistar at kenna og fekk nýggj perspektiv til fleiri av avbjóðingunum, ið standa fyri framman.*
*Eg vil avgjørt mæla limafeløgunum hjá FUR til at taka av líknandi tilboðum, tí sambandið, mann fær við eldsálir úr øllum heiminum, er nakað heilt serstakt."*



**Á myndini sæst Dánjal saman við einum finskum ungdómsumboði í samrøðu við finska umhvørvis- og veðurlagsmálaðharran, Emmu Kari.**

# Ungdómsvenjingin hjá NUBF

Anna Háberg, Jastrið Gullbein Augustinussen og Jákup J. Eskildsen luttóku á ungdómsvenjingini 6.-8. mai 2022. Norðurlendska verkætlanin NUBF var fyriskipari av ungdómsvenjingini 2022.

### Frágreiðing frá umboði um luttøkuna á ráðstevnuni

*"Legan var á oynni Utøya í Norra, sum er kend fyri terrorálopið í 2011, har 69 fólk lótu lív. Hesuferð var evnið fólkaræði og inkluderandi felagsskapir.*



**Á myndini eru Anna Háberg, Jastrið Gullbein Augustinussen og Jákup J. Eskildsen.**

*Á leguni arbeiddu vit við opinleika, hvat tað merkir, og hvussu mann skapar meiri inkluderandi felagsskapir. M.a. arbeiddu vit við, hvussu innanhýsis normar kunnu tarna inklusión og eisini tarna tí endamáli, felagsskapir vilja fremja.*

*Ungmannafelagið AUF, hevði framløgu um týdningin og avmarkingarnar við fríari talu, og hvussu týdningarmikið fólkaræði er.*

*Rundferð var á savninum á Utøya, har ein, sum var til staðar í 2011, greiddi okkum frá um hendingina.*

*Tað var ógvuliga kensluborið at hoyra um, hvussu tað var at vera á oynni, tá ið álopið fór fram, og um arbeiðið hjá AUF "at taka oynna aftur"; AUF hevur ynskt, at oyggin aftur skal vera tað stuttliga og ævintýrliga staðið, tað altíð hevur verið.*
*Nógv av teimum, sum eg hitti á ferðini, eri eg blivin góður vinur við, og sigast kann eisini, at eg nú kann fara til eitt og hvørt land i Norðurlondum at hitta onkran, eg kenni."*

## NORDBUK

Uttanríkis- og Mentamálaráðið hevur heitt á FUR um at tilnevna umboð og varaumboð í NORDBUK (Nordisk Børne-og Ungdomskomité).

Nordbuk er ráðgevandi og samskipandi í yvirskipaðum barna- og ungdómsmálum í Norðurlandaráðnum.

Formaður FURs. Rói B. Poulsen er umboð vegna FUR í Nordbuk, og skrivstovan varaumboð.

## Norden 0-30

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur heitt á FUR um at tilnevna umboð í Norden 0-30 undir Norðurlandaráðnum fyri tíðarskeiðið 1.1.2023 – 31.12.2025.

Dánjal Hátún Augustinussen er tilnevndur sum tiltakslimur í Norden 0-30.

Norðurlendska barna- og ungdómsnevndin (NORDBUK) stendur fyri Norden 0-30, og Nordisk Kulturkontakt umsitur skipanina.

Norden 0-30 er ein stuðulsskipan, sum stuðlar barna- og ungdómsfelagsskapum í Norðurlondum.
Stuðul kann latast til verkætlanir og netverk, har børn og ung hittast og luttaka í virksemi viðvíkjandi mentan, politikki og/ella sosialum virksemi.

Stuðulsskipanin leggur dent á, at børn og ung luttaka í øllum stigunum í virkseminum, frá hugskoti til veruleika, í so stóran mun, sum møguligt.

